# Brúkarin

Nr. 200 • mikudagur • 17. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ójavni millum kynini – eisini í barnaárunum



*Rigmor Dam*

**Dreingir fáa fleiri lummapengar, forvinna meira og hava størri nýtslu enn gentur. Hetta vísa nýggjar danskar kanningar**

Umframt at gentir og dreingir kunnu væntað sær vanbýti á arbeiðsmarknaðinum í vaksnalívinum, skulu tey í barnaárunum eisini lata sær lynda vánaliga javnvág í familjunum, har genturnar fáa færri lummapengar og færri nýtsluvørur enn dreingirnir.

Kanningar vísa, at dreingir fáa fleiri lummapengar, forvinna meira í frítíðini, spara meira upp og eiga fleiri nýtsluvørur enn genturnar. Í at kalla øllum aldursbólkum eiga og fáa dreingir meira enn gentur.

Hetta vísa nýggj tøl í 'Børns Opvækst som Forbrugere' - ein bók frá "Forum for Reklameforskning" við Handilsháskúlan í Keypmannahavn, sum ikki er almannakunngjørd enn. Tølini eru grundað á donsk viðurskifti, men eru ivaleyst ikki so fjar frá okkara viðurskiftum heldur.

## Fleiri lummapengar

Í aldursbólkinum fimm til sjey ár fáa dreingirnir góðar 73 krónur um mánaðin, meðan genturnar fáa einar 68 krónur í miðal. Sama myndin ger seg galdandi hjá teimum átta til tíggju ára gomlu, har munurin er einar 17 krónur, til dreingjanna fyrimun.

Hjá teimum 11-12 ára gomlu og teimum 13-15 ára gomlu er munurin á lummapengunum ávíkavist 28 og 34 krónur. Bara hjá teimum 16-18 ára gomlu fáa genturnar fleiri lummapengar - nevniliga 625 krónur í miðal, í mun til dreingjanna 608 krónur.

Dr. pæd. Birgitte Tufte frá Danmarks Pædagogiske Institut, sum granskar nýtsluna hjá børnum og ungfólki, sigur um tølini:

- Dreigirnir siga hvat teir vilja hava og seta fleiri krøv. Vi vita eisini at hugsan teirra hevur ávirkan, tá ið familjan skal keypa nýggjan bil til dømis.

- Men eg haldi eisini at tølini prógva at hjá nógvum er ein feril av gamlari siðvenju enn galdandi í familjunum. Vit skulu bara hálvtannað ættarlið aftur, tá tað var betur at fáa ein drong fyrst.

## Sjónvarp og telda á dreingjakamarinum

Tá um ræður sjónvarp, video, teldu og aðrar nýtsluvørur á kamarinum, eru dreingirnir eisini betur fyri.

Miðlagranskarin Kirsten Drotner sigur í bókini 'Medier For Fremtiden', at 37 prosent av dreingjunum í aldursbólkinum seks-sjey hava egið sjónvarp á kamarinum, í mun til 25 prosent av gentunum. Hendan fyrimun varðveita teir allan barndómin.

30 prosent av dreingjunum hava teldu uttan fløguspælara á kamarinum, meðan hetta er veruleikin hjá 16 prosentum av gentunum. Teldu við fløguspælara hava 23 prosent av dreingjunum, í mun til átta prosent av gentunum.

Einastu økini har genturnar eru betur fyri, er í samband við telefonir, fløguspælarar og bandspælarar.

## Nýtslan hjá gentum sjónligari

- Tað er ein gamal sannleiki, at gentur forvinna minni og hava eina øðrvísið nýtslu, sigur Kirsten Drotner.

- Nýtslan hjá gentunum er meira beinleiðis og sjónlig, so sum smyrsl, móti og líknandi, meðan nýtslan hjá dreingjum er meira langtíðarkend og fjald. Teir savna ofta pening saman til størri lutir. Nógv foreldur síggja allarhelst nýtsluna hjá gentunum sum marglæti og fjas, og tað hjá dreingjunum sum skilabetri, siger Kirsten Drotner.

Sambært Birgitte Tufte taka genturnar ímóti nýggju miðlunum á ein annan hátt enn dreingirnir. Tí koma krøvini til telduna og internetsambandið seinni enn hjá dreingjunum.

- Genturnar eru meira áhugaðar í at samskifta. So tá ið tær gerast varugar við, at tær kunnu nýta nýggju miðlarnar í gerandisdegnum - til dømis internetið at chatta við - fara tær at ynskja sær fast internetsamband. Dreingirnir ynskja sær teldur at royna seg á, sigur Birgitte Tufte.

## Dreingir forvinna nógv

Áhugin fyri at forvinna pening er sum heild størri hjá dreingjum. Teir arbeiða fleiri tímar enn genturnar og forvinna eisini meira. Munurin er størstur í 16-18 ára aldrinum, tá genturnar forvinna í miðal 2663 krónur um mánaðin, í mun til 3105 krónur hjá dreingjunum.

Hetta er eisini orsøkin til at dreingirnir kunnu savna meira pening saman. Bara teir átta til tíggju ára gomlu dreingirnir savna færri pengar saman, í mun til vinkonurnar.

Bókin hjá Kirsten Drotner, 'Medier For Fremtiden', kom út á forlagnum Høst og Søns Forlag í 2001

*Kelda: Forbrugerinformation*



# Regnklæði

**Einki eitur vánaligt veður - einans vánalig klæði! Kortini er ikki altíð so lætt at finna hóskandi klæði, til váta veðrið hendan partin av árinum**

Tó er okkurt, sum vit kunnu hava í huga, tá vit keypa nýggj regnklæði. Svenski brúkarastovnurin Konsumentverket hevur kannað regnklæði og gevur í hesum sambandi nøkur góð ráð. Øll kanningin stendur at lesa í brúkarablaðnum Råd & Rön nr. 7 frá august 2001.

## Góð ráð

- Um regnklæðini eru sveisaði saman, kanst tú kanna eftir, um sveisingin hevur tikið við framvið øllum seyminum.

Um seymurin situr á herðunum er vandi fyri at hann savnar vætu, sum kann treingja inn undir klæðini. Tí er betur at keypa ein regnjakka, sum ongan seym hevur á herðunum ella ein við raglanermum.

- Best er um snarlásið er fjalt, soleiðis at væta ikki treingir inn í smáu opini.

- Týdningarmikið er at klæðini hava andingarop, til dømis undir ermunum, har regnið ikki sleppur inn. So kunnu vit eisini vera í einari fjálgari føroyskari troyggju innanfyri, um leiðin gongur niðan í fjøllini ella út á sjógv.

- Vel regnklæði uttan PVC - serliga til børnini. PVC inniheldur vandamikil phtalatir, sum børnini kunnu fáa í seg, um tey koyra klæðini í munnin. Keyp í staðin regnklæði, sum eru klødd við PUR (polyurethan).

## Vætuverja

Oftast eru regnklæðini vætuvard (impregneraði), men vætuverjan verður slitin so hvørt sum regnklæðini verða vaskaði og brúkt. Kanna javnan eftir um verjan er heil við at leggja ein dropa av vatni á klæðini. Um dropin enn er "fullur" tá eitt korter er farið, er í lagið. Um ikki, kanst tú viðgera klæðini við impregnering frá málingahandlinum.

*Kelda: Konsumentverket*

# Dekkhosur í hálkuni

**Normenn hava uppfunnið eina dekkhosu til hálku**

Vetur og kuldi eru í nánd, og sostatt hómast eisini vánalig koyrilíkindi, píkadekk og ketur. Tí er tað ein fragd at hoyra um nýggjar loysnir, í hesum føri frá normonnum, ið hava uppfunnið einar hosur úr toyi, til at hála niður um dekkini. Hóast royndir hava víst at hosurnar í summum førum kunnu kappast á jøvnum føti við píka- og vetrardekk, eru tær ikki ætlaðar at koma í staðin fyri hesi, men heldur sum ein hjálp til teirra, sum hava summardekk, og sum óvæntað koma í hált føri. Loyvt er tí einans at koyra 50 km/t við hosum á hjólunum.

Nýggju hosurnar eru úrslitið av einum samstarvi millum norska uppfinnaran Bård Løtveit, eitt tekstilvevarí á Notoddanum og ein friktiónsgranskara í Trondheim, og vórðu tær fyrstu ferð sýndar fram á einari bilmessu í Týsklandi herfyri.

Hosurnar eru vevaðar úr sama toyi sum norska verjan nýtti til ryggsekkir fyrr í tíðini. Sig so tað! Kanska áttu vit føroyingar at tikið kappingina upp og bundið dekkskóleistar úr føroyskari broddaull?

*Kelda: www.forbrukerrapporten.fo*



# Leivur letur aftur

**Enn ein bygdahandil hvørvur. Leivur Kjærbo í Sumba snarar nú lykilin, eftir at hava rikið handil í 31 ár og eftir at handil hevur verið í húsinum síðani 1941. Hóast tað ikki er lætt at reka smærru handlarnar á bygd, heldur Leivur grundarlag vera fyri handlinum, men eingin er áhugaður at taka við**

HANDILSLÍV
*Dagfinn Olsen*



*Leivur Kjærbo í Sumba gevst nú sum handilsmaður, eftir í 31 ár at hava rikið handilin, sum pápin byrjaði í 1941. Málningalist hevur hansara áhuga og hann hevur sjálvur málað málningin yvir sofuni. Stundirnar verða betri nú til ymisk ítriv*

Ein sannroynd er tað, at smærru handlarnir kring landið, eins og í høvuðsstaðnum, hava ikki havt tað lætt seinnu árini. Rákið er við størru eindunum, handilsketunum, ið smærru fyritøkurnar ikki megna at kappast við. Ein fyri og annar eftir eru handilsgluggar myrknaðir seinnu árini og nú hvørvur enn ein handil.

Kemur ein í hesum døgum framvið handlinum hjá Leivi Kjærbo í Sumba, so er ikki nógv eftir á hillunum. Matvøran er burtur og restin fer fyri bíligan penga. Skilliga sæst, at her hevur verið mangt og hvat at fáa. Klæði, gávulutir, amboð og jólapynt.

Í september í 1970 byrjaði Leivur í handlinum. Leivur Kjærbo hevur sostatt í 31 ár rikið handil í Sumba, men letur nú aftur. Hann fyllir í næstum 77 ár og heldur tíð vera at gevast, nú hann er farin 10 ár framvið pensjónsaldrinum.

Tað er ikki tí, at Leivur ikki metir grundarlag vera fyri handlinum, at hann gevst. Men eingin er áhugaður í at taka við.

Leivur hevur tí bíðað við at lata aftur, tí hann vildi ikki, at eingin handil skuldi verða í bygdini, men onnur eru nú byrjað við handli. Nú er lív komið í aftur gamla handilin á Ólafløtti og so helt Leivur eitt høvi verða hjá sær at gevast. Hesin handil var úthandil hjá monnunum á Gørðunum í Vági, fram til einaferð í fýratiárunum.

## Síðani 1941

Tað var pápi Leiv, ið byrjaði handil í 1941 og helt á til einaferð í fimtiárunum. Síðani tók ein bróður Leiv við og helt á til 1958, tá hann flutti til Havnar og í Smæruna at starvast. Annar bróður tók við og helt á til 1970, tá Leivur tók við.

Sjálvur var Leivur niðri í Danmark frá 1955 til 1970.

Sostatt er talan um eina gamla familjufyritøku, ið nú fer í søguna.

## Neyðugt við handli

– Ein handil á bygd skal leggja dent á matvøru, sigur Leivur, tá spurt verður um líkindini at reka handil uttanfyri miðstaðarøkið.

– Fólk fara til Vágs og á Tvøroyri at keypa, tá góð tilboð eru. Vit hava ikki grundarlag fyri somu tilboðum. Men um ein dugir, so er grundarlag fyri at reka handil. Tað er eisini neyðugt at hava handil í Sumba. Nógv eldri fólk eru og fólk kann ikki fara av bygdini, um tey skulu hava ein pakka av the, sigur Leivur og nevnir, at aðrastaðni, t.d. í Noreg, hava myndugleikarnir tikið stig til at varðveita smærru handlarnar kring landið, júst tí at fólk, ið har eru, hava tørv á handli.

Eingin loyna er kortini, at stríð er av at reka handil, serliga við matvøru.

– Tá vit fingu MVG, kom eisini nógv umsitingarligt arbeiði, sigur Leivur.

Men Leivur hevur havt nógv at bjóða, umframt matvøru.

– Vit hava havt alt møguligt og hava eisini útvega ymiskt. Tað hevur verið eitt slag av kundatænastu, sigur Leivur.

## Ikki svárt

Tann 1. oktober gavst Leivur við matvøruni og nú skal restin bara seljast út.

Men Leivur Kjærbo metir tó ikki, at tað er so svárt at gevast.

– Eg eri fyrireikaður og havi eisini bíðað eftir høvi at gevast, sigur Leivur, ið fegnast um, at yngri kreftir nú lata upp handilin á Ólafløtti, so handil aftur er í bygdini, hóast hann sjálvur letur aftur.

– Men eg fari eittnú at sakna at práta við fólk, sigur Leivur, sum ikki er bangin fyri at keða seg, nú handilin ikki er longur. Heldur ikki, hóast hann ongantíð hevur tímað at fingist við seyð.

– Eg havi ymisk onnur ítriv og einum nýtist als ikki at keða seg, sigur Leivur Kjærbo og í stovuni sæst, at málningalist hevur hansara áhuga. Har eru málningar eftir kend og minni kend listarfólk. Undir onkrum málningi sæst, at Leivur Kjærbo sjálvur hevur málað.

– Kanska eg fari at mála eitt sindur aftur, sigur Leivur.



*Maibritt úr Hørg hevur starvast hjá Leivi Kjærbo í mong ár. Nú tynnist á hillunum, men enn ber til at ogna sær okkurt fyri bíligan penga*




*Enn ein handil hvørvur. Mong kenna kanska handilin hjá Leivi Kjærbo úr filminum Bye Bye Blue Bird. Ein fyri og annar eftir eru handilsgluggar myrknaðir seinnu árini og brátt er heldur ikki hesin bygdahandilin longur*